## DAGSINS MEINING

# Mugu endiliga ikki framleiða sjálvi

Vit hava eina rúsdrekkalóg, ið loyvir innflutningi av víni og brennivíni, men føroysku myndugleikarnir loyva ikki framleiðslu av hesum vørum í Føroyum. Moralurin tykist verða, at tað er í lagi, at føroyingar leska sær við innfluttum vørum, men teir mugu fyri alt í verðini ikki sleppa at framleiða vín ella brennivín sjálvir. Hvør grundgevingin er fyri hetta er ringt at siga, men Løgtingið hevur ivaleyst eina forklåring, hóast vit loyva okkum at ivast í góðskuni av hesari.

Tað tykist verða dupultmoralskt, at hava ein politiskan hugburð, ið sigur, at tað er í lagi, bara kenningin útlendsk er.

Eitt annað løgið við okkara rúsdrekkalóg er, at man loyvir eitt nú víni og portvíni, men ikki øli sterkari enn 5,8%. Hetta man helst eisini hava eina forklåring, men spurningurin er um nøkur forklåring, ið heldur í ár 2004, finst.

Fyri at skilja okkara rúskdrekkalóg, so má ein hyggja at søguni. Tá atkvøðugreiðslan um nýggju rúsdrekkalógina var í 1992, ið loyvdi Rúsdrekkasølu í Føroyum, heldur enn postordrasølu, tá kom henda lóg akkurát ígjøgnum. Tað tykist, sum allar broytingar eru sera torførar at fáa ígjøgnum, og tí eigur man at hava virðing fyri teimum politikarum, ið hava megnað at fingið broytingar ígjøgnum, við at taka smá stig rætta vegin. Ein alt ella einki hugburður kemur okkum ongan veg.

Vónandi fara hesi smáu stigini rætta vegin at halda fram. Tað eru helst nøkur í hesum samfelagnum, ið ynskja sær eina skipan sum í Danmark, men um onkur legði uppskot um hetta fyri tingið nú, so fall tað við einum braki. Vit mugu minnast til, at ein minniluti í Føroyum framvegis ynskir fullkomuligt rúsdrekkabann, meðan mong vilja tað sum nú, men ikki fríari. Vegurin fram uppá stutt sikt má finnast í millum tey, ið vilja lata púra leyst og tey, ið vilja, at alt vín í Føroyum gjørdist vatn.

Spurningurin er, um hetta ikki er rætta løtan at sleppa av við í hvussu so er einari av mongu andsøgnunum í rúsdrekkalógini. Hví ikki byrja við at loyva føroysku bryggjaríunum at bryggja øl sterkari enn 5,8%? Hetta grundgeva bryggjaríini væl fyri í umsókn til Vinnumálaráðið, og leggja tað fram sum eina útflutningverkætlan. Tað hevði verið gott, um man kundi útflutt hesa vøru, men vit loyva okkum at spyrja, hví man ikki eisini kann loyva føroyingum at drekka hesa vøru. Føroyingar sleppa sum er at keypa vín og brennivín, ið er nógv sterkari, enn tann vøra, føroysku bryggjaríini ætla at framleiða. Hvat er endamálið við at forbjóða øli sterkari enn 5,8%?

Ein endurskoðan av rúsdrekkalógini er uppá sítt pláss, og helst er tíð at taka eitt fet afturat fyri at koma mongu andsøgnunum í hesu lóggávu til lívs.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Skomm Sambandsfloksins

**Hans J. Petersen**

Slíkan hevndarhug, jonkasligheit og illoyalitet móti sínum floksfelaga og landsstýrismanni, skal ein leita leingi eftir

Tað er einki annað enn stór skomm, at sambandsmenn og kvinnur í Suðurstreymoy, Eysturoy og Klaksvík í berum illsinni og á besta jantelógarhátt, vóru teir sum undirgróvu trúvirði landsstýrismansins og harvið, við hjálp frá Jóanes Eidesgaard, avhøvdaðu sín egna landsstýrismann tann 23. februar.

Tit eru stór skomm fyri flokkin og eru als ikki nøkur góð fyridømi fyri hvussu ein skal vera, fyri at vera politiskt korrektur í sambandseygum. Eingin av tykkum røkkur sambandstingmanninum úr suðri til kníggja.

Allar tær svínsku illgitingar, niðurgerð og beinleiðis ósannindir sum tykkara tabloidpressa gamla Dimma, saman við Fregnum smíðaðu saman vóru á siðiligan hátt afturvístar, men tit hava gjørt tykkum og flokkinum fyri skommum, skamm fái tykkum og »óheftu politisku« Dimmu fyri tað.

Tað var munur á at síggja, hvussu væl fólkafloksmenn vardu sín mann tá álopini frá pressuni leikaðu harðast á, meðan tit ístaðin søgdu sum fariseararnir á sinni »krossfest, krossfest«, og tit fingu eisini landsstýrismannin krossfestan. Líti á míni orð, handan skarnsgerðin kemur tykkum aftur um brekku í gráum kálvsskinnið.

Johan Dahl hevur ikki á nakran hátt forbrotið seg, men hevur verið við í vinnulívinum bæði her heima og útlondum frá heilt ungum árum og roynt at bygt brýr, tað er meir enn kann sigast um tykkum, sum stungu hann so dyggiliga í ryggin.

Johan Dahl var uttan nakran iva nógv best egnaði landsstýrismaðurin til fiskivinnumál, sum er í hasi samgonguni, við síni stóru altjóða vitan um fiskivinnu og sínum altjóða netverki.

Úrslit av hansara effektiviteti sást eisini eftir hansara einans 20 døgum í stýrinum sama dag sum hann fór frá, tí ikki nakar ivi er millum manna um, hvør setti tær framdu broytingarnar, ella sokallaðu umrokeringarnar í leiðsluni í fiskimálastýrinum út í kortið.

Sannleikin um, hvat einkjan og dótturin hava goldið sjálvar, kemur einferð fyri ein dag.

Ein harmilig gerð, ein skomm fyri politisku skipanina og ein skomm fyri rættarsamfelagið Føroyar.

# Fjórði løgmaður av Tvøroyri …

**Sverre Midjord**



**Á móttøku, sum var á Tvøroyri fyri løgmanni Jóannes Eidesgaard, helt Sverri Midjord røðu**

Harra løgmaður!

Fyrst hjartaliga tillukku og góða eydnu við hesum stóra áliti sum tú hevur fingið.

Tað er ein stór avbjóðing, tað verða ikki bara viðrák og ljósar tíðir. Rákið verður ikki altíð við. Tá er avgerandi fyri teg, at tú hevur baklandið við, ikki bara tað politiska men meira tað persónliga, og at tú hevur familjuna við tær, bæði tú og kona tín eru av góðum bergi brotin.

Tann legendariski yrkjarin Pól Johs. av Miðgerði er ættarfaðir tykkara. Miðgerð ættin er kend fyri at vera erlig, hjartalig og hjálpsom.

Poul F. sáli sigur í seinastu heilsan síni til P. M. Dam sála

*Tú ofta stóð sum drangur*
*í ódn –*
*Ein viti sum langa leið*
*lýsti*
*mót øllum á lívsins*
*skuggasíðu*
*tú hjálp og hjartalag vísti*

*Neyvan javngóður maður*
*kemur*
*í merkismanns sess at sita*
*Dam hann sum lyftir tín*
*mikla arv*
*má næstan fjøll kunna*
*flyta.*

Eg havi lagt merki til, at tú Jóannes ofta endurgevur Oluf Palme sála, og tað er bara gott. Tú hevur Oluf Palme sum fyrimynd, eg havi P. M. Dam.

Vit byggja okkara politiska á tey og teir, sum undan fóru. Tú ert fimti, løgmaður úr Suðuroy – fjórði á Tvøroyri – og ikki at gloyma annar av Tippinum. Livir tú upp til teir, sum undan fóru, so fer at gangast væl.

Hjartaliga tillukku og góðan byr.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Ringasta gerð nakar flokkur hevði gjørt ímóti sær sjálvum

**Zacharias Bech**
*Porkeri*



Eftir løgtingsvalið kom sambandsflokkurin í Samgongu, og vit í Suðuroynni fingu ein landstýrismann, nakað, vit ikki høvdu havt í 34 ár.

Sjálvandi vóru vit fegin, tá valið fall á Johan Dahl, tí vit sum kenna hann og hansara ágrýtni og hansara arbeiðsevni, vóru ikki í iva um, at hann fór at vera til gagns, fyrst fyri føroyska fiskivinnu og harvið fyri alt Føroya land og síðan fyri menning av Sambandsflokkinum í Suðuroynni. Samstundis vóru vit eisini fegin um at fáa Jaspur Vang inn sum tingmann. Hóast hann ongantíð hevði roynt tað fyrr, so eri eg onga løtu í iva um, at hann hevði roynst Sambandsflokkinum fyrst og síðan Suðuroynni góður stuðul.

Men gleðin var stokkut, tí bert tjúgu dagar seinni bleiv Johan Dahl av Jóannes Eidesgaard, løgmanni, loystur úr starvi, orsakað av skriving í bløðunum um hansara fortíð sum stjóri á Vágs Skipasmiðju og eftirfylgjandi greinar, fyltar av póstandum og illgitingum, sum allar høvdu til endamáls at seta Johan Dahl í ringt ljós.

Bløðini drivu, tá ið hann sat sum landsstýrismaður, eina heksajakt móti Johan Dahl.

At Oyggjatíðindi og Fregnir gjørdu tað, er at liva við, men at Dimmalætting skuldi ganga á odda í útspilling av einum landsstýrismanni hjá Sambandsflokkinum, kann eg sum sambandsmaður ikki góðtaka. Havi tí gjørt av at gevast sum haldari av hesum blað.

Tá Dimmalætting sigur seg ikki longur at vera heft at Sambandsflokkinum, átti blaðstjórin, sum nú er limur í landsnevnd Sambandsfloksins, sjálvboðin at farið úr nevndini.

Eisini er tað at fara út um alt mark, tá bæði fyrrverandi og núverandi formaður á forsíðuni í Dimmalætting, krossfesta sín egna landsstýrismann eftir eini grein, sum ein fríggjamorgun stóð í Fregnum, beint áðrenn tingmanning Sambandsfloksins er samankallað til at fáa eina frágreiðing frá Johan Dahl um tað, sum fregnir hevur skrivað, fyri síðan eftir fundin sama kvøld at koma í sjónvarpið og siga, at øll tingmanningin stóð aftan fyri Johan Dahl sum landsstýrismann.

Sambandsflokkurin hevur tað ikki gott í løtuni. Hann hevur ongan leiðara, og tað hevur hann ikki havt trý tey seinastu árini.

Skaðin hendi, tá nakrir ávísir persónar í Sambandsflokkinum tóku seg saman at fáa Edmund Joensen frá sum formann. Teir royndu fyrst í 1998. Tá miseydnaðist tað, men trý ár seinni var eydnan við teimum, til stóra ólukku fyri Sambandsflokkin, tí var hann áðrenn í øskuni, so bleiv hann eftir hetta førdur inn í eldin.

Hvørjir hesir persónar vóru er eingin grund til at nevna, men teir eru næstan allir farnir í gloymskuna, sum taparar politiskt sæð. Men teir náddu at sáa vind, og flokkurin heystar nú storm.

Edmund Joensen, haraftur ímóti, sum av sambandsfólki bleiv vrakaður sum formaður fyri flokkin, fekk uppreisn. Ikki av sínum egnu, men av sínum politisku mótstøðumonnum, sum lyftu hann uppá hægsta politiska tindin við at velja hann til løgtingsformann. Øll kenna vit frásøgnina um »steinin, sum smiðirnir vrakaðu«.

Eg havi fyrr ásannað tað, men ongantíð so nógv sum nú, tá framstandandi tjóðveldismaður, umborð á »Smyril« segði við meg kvøldið eftir at Edmund Joensen var farin frá sum formaður fyri Sambandsflokkin, at hetta var ringasta gerð, ið nakar flokkur hevði gjørt ímóti sær sjálvum. Og hann meinti tað.

Tá nýggjur landsstýrismaður skuldi veljast fyri Johan Dahl høvdu vit her suðuri ein kvalifiseraðan mann. Vit hildu eisini, at tað var heilt natúrligt, at vit varðveittu landsstýrismannin.

Men meirilutin í tingbólkinum vildi tað øðrvísi. Teir valdu nýggjan landsstýrismann úr Norðoyggjum. Hví teir gjørdu tað, er ilt at meta um. Men tað verður áhugavert til aðalfundin hjá Sambandsflokkinum at síggja, hvønn atkvøðurnar frá norðoyggjum fara til, tá atkvøtt verður um nýggjan formann fyri flokkin. Fara tær møguliga til Suðurstreym?

Mítt hægsta ynski er, at Sambandsflokkurin til aðalfundin komandi fær ein góðan og sterkan formann, sum kann føra flokkin fram til tað, hann var. Álitið í føroyskum politikki.

PS. Nú eru útvið 2 vikur gingnar, síðan Johan Dahl var settur frá sum landsstýrismaður. Í hesum tíðarskeiði hevur einki verið at sæð í Dimmalætting um nevnda persón.

So er tað altso veruleiki, at skrivingin hevði til endamáls at fáa Johan Dahl frá sum landsstýrismann.

Spurningurin, um hetta var bílagt arbeiði, og av hvørjum tað bleiv bílagt, stendur framvegis eftir.

# Peningur sum fossar

**Helgi Abrahamsen**



»Peningur fossar úr landskassanum« er yvirskriftin á eini grein, sum Høgni Hoydal hevði í bløðunum 9. mars. Greinin er partur av eini herferð, sum Tjóðveldisflokkurin hevur koyrt í fjølmiðlunum ta seinastu tíðina, har endamálið er at frásiga flokkinum alla ábyrgd av fíggjarligu støðuni, sum landið er komið út í.

Boðskapurin sum Tjóðveldisflokkurin roynir at fáa fram, er, at til og við 5. desember 2003 varð "sitið tungt á kassanum", men at longu dagin eftir at val var útskrivað, kom vend í. Vánaliga úrslitið hjá landskassanum í 2003 hevur við øðrum orðum einki við tær 49 vikurnar frá 1. januar til 5. desember at gera, men alt er úrslit av manglandi fíggjarstýring tríggjar tær seinastu vikurnar av árinum (jólavikan íroknað).

**Minni fossar inn**
Hyggja vit eftir, so síggja vit, at peningafossurin úr landskassanum er ikki vaksin meira hesa seinastu tíðina, enn hann hevur gjørt nú í nógv ár. Munurin er bara tann, at nú fossar minni inn í kassan, og tí verður eisini minni eftir. Og hví fossar minni inn í kassan? Ein orsøk er verri fiskaprísir, ein er trupulleikar í alivinnuni, og ein er, at undanfarna landsstýrið bað um at fáa minni ríkisstuðul úr Danmark (bert fyri at nevna nøkur dømi). Hetta seinasta hevur tá inniverandi ár er íroknað, kostað landskassanum 1,2 milliardir krónur. (Ein ikki so lítil fossur).

At koma í bløðini nú og siga, at tað er manglandi avgjald á grønar keksir, sum ger alt útslagið, er at undirmeta vitanina hjá føroyingum.

**Skjótir at rigga av**
Sigast má, at Tjóðveldisflokkurin hevur lættari við at rigga av, enn at rigga til. Tí hóast Karsten Hansen bleiv valdur til landsstýrismann tann 15. mai 1998, so segði hann í samrøðu við Sosialin tann 24. september sama ár, at "tað verður ikki fyrr enn á fíggjarlógini fyri ár 2000, at politikkurin hjá samgonguni rættiliga fer at vísa seg". Tað vil siga, at tað skuldi taka meira enn hálvtannað ár, áðrenn føroyingar veruliga fóru at merkja, at ein nýggj samgonga var komin til. Men nú tá Tjóðveldisflokkurin riggar av, følir hann seg leysan av allari ábyrgd longu dagin eftir at hann hevur latið hurðina aftur í Tinganesi.

**Hvør hevur ábyrgdina?**
Tjóðveldisflokkurin má ikki halda, at tað er nýggja samgongan, sum hevur lækkað fiskaprísirnar á heimsmarknaðinum, og tað er heldur ikki samgongan, sum hevur skapt trupulleikarnar í alivinnuni. Men allir føroyingar vita, hvør hevur staðið á odda fyri átakinum, sum tá hetta árið er runnið, hevur kostað landskassanum 1,2 mia. krónur.

# Føroyar fyri 40 árum síðani ella Føroyar í dag!

**Opið bræv til:**
Tórshavnar Býráð,
nevndin í sosialu deild
og Almanna- og
heilsumálastýrið

Hugleiðingar og spurningar eftir at Dagur og Vika tann 16. feb. 2004 segði, at tað er upp á tal at senda ein **5 ára** gamlan drong, við diagnosuni DAMP, til Danmarkar á viðgerðarstovn.

Tó at vit ikki kenna alla søguna um hendan drong, so má tað sigast, at tað kennist sum at verða send 40 ár aftur í tíðina, tá ið vit sendu evnaveik **børn** av landinum, tí vit ikki áttu serkunnleika til at taka okkum av hesum børnum.

Hava vit í Føroyum einki lært av tí, sum fór fram tá??

Vit hildu, at vit í Føroyum vóru blivnar klókari, tí vit síggja í dag, at tað vóru børnini, ið tá vóru send av landinum, og familjur teirra, ið bóru tann menniskjansliga prísin fyri ta fávitsku, ið var tá.

Tað kann ikki verða rætt, at vit í Føroyum í ár 2004 senda kreppurakt børn av landinum, tí vit ikki megna at taka okkum av teimum. Er tað so, má okkurt gerast! Væl vitandi at hesin drongurin langt frá er tann einasti, ið hevur DAMP ella líknandi trupulleika í Føroyum.

Vit/samfelagið eiga at taka okkum av **øllum** okkara borgarum og **serliga** av børnunum. Vit eru klár yvir, at børn við serligum tørvi "kosta nógv", men tað er júst tí, at vit sum samfelag mugu standa saman og taka okkum av trupulleikanum, og ikki lata tað til tann einstaka, so at tað er tilvildin/pengapungurin, sum verður avgerandi fyri, hvør ið fær ta røttu hjálpina.

Vit eiga at taka okkum av teimum trupulleikum, vit hava her á landi og ikki senda tey av landinum. Vit eiga ábyrgdina, og eiga at gera tað **besta** fyri okkara børn. Sjálvsagt eiga vit at fáa hjálp og vitan aðrastaðni frá, fara til kanningar og fáa viðgerð aðrastaðni, tí okkara samfelag er ov lítið til at hava servitan á øllum økjum. Men tað er ikki tað sama sum at senda eitt **5 ára** gamalt barn á bústovn í einum øðrum landi. Við okkara vitan í dag um, hvussu umráðandi tað er, at børn vaksa upp í einum tryggum umhvørvi saman við teirra umsorganarpersónum (vanl. foreldrum), er tað alt, ið talar ímóti eini slíkari gerð. Hetta er tá hugsa verður um tað vælvirkandi barn, og sjálvandi enn minni, tá tað er talan um eitt barn við trupulleikum frammanundan.

Man hevur fyrr sæð, at tað hevur verið gjørdur ein stovnur um eitt barn/ungling, tí man onga aðrastaðni hevði at koyra júst hetta barnið/ unglingin - hví ikki til hendan **5 ára** gamla dreingin? Hvar eru øll hini DAMP-børnini hjá okkum? Senda vit eisini tey av landinum? Er tað enn einaferð spurningur um pengar? Hevði tað ikki verið bíligari í longdini, um vit í Føroyum fingu okkum henda serkunnleika?

29. februar 2004 kl.20.00 í SvF sóu vit enn eitt dømi, har ein familja ið hevði stóran tørv á hjálp til dóttur sína, meira ella minni bleiv vrakað, bæði av dagstovninum og kommununi tey búgva í. Tað at dagstovnurin og kommunan bera seg soleiðis at mótvegis familjuni, kunnu vit bert síggja sum hjálparloysi ella eitt neyðarróp, tí at tey ongar aðrar møguleikar vita sær. Hetta rættvísger kortini ikki teirra avgerð.

Tað kann í øllum førum ikki verða rætt, at man ikki kann gera nakað fyri henda stakkals drong og familju hansara, sum er so hart rakt frammanundan. Her heima hevur hann hóast alt tvær systrar, ommu, abba, mostur, mammubeiggjar og onnur, ið fegin vilja rætta eina hjálpandi hond.

Tað er okkara innarliga vón, at avvarandi landsmyndugleikar finna eina aðra loysn enn at senda henda drong av landinum, til frama fyri hann og onnur børn í líknandi støðu.

Vinarliga heilsan

**Edda Hjartvarsdóttir og Maika L. Dahl (og 24 aðrar undirskriftir, ið eru sendar avvarðandi myndugleikar)**